Ferðavinnufelagið

fylgiskjal 11

Heilsu- og Innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Att.: Hilmar Høgenni

Tórshavn 24. maj 2018

Okkara tilv./Our ref.:
/Heilsu-Ferxa-V
Tykkara tilv./Your ref.:

**Uppskot til ll. um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (Náttúrumargfeldislógin)**

Víst verður til teldubræv frá Heilsu- og Innlendismálaráðnum sent okkum hin 6. apríl, har lógaruppskot um náttúrumargfeldislóg verður sent okkum til hoyringar.

Ferðavinnufelagið fegnast um, at landið við hesi lóg vísir vilja til at verja føroysku náttúruna og við hesum skipar karmar fyri einum burðardyggum brúki av náttúruni, soleiðis at føroyingar hava eitt nútíðarhóskandi lógarverk at halda seg til, tá ið teir nýta og njóta náttúruna her í landinum.

Av tí at talan er um eina heimildarlóg er tórført at koma við ítøkiligum viðmerkingum til lógaruppskotið, tí avleiðingarnar av uppskotinum gerast ikki greiðar, fyrr enn nærri ásetingar verða lýstar í kunngerðum. Viðvíkjandi økisverndini verður til dømis nevnt, at avleiðingarnar fyri vinnuvirksemið eru ivasamar, tí tað veldst um hvørjar verndarásetingar verða ásettar í verndarkunngerðunum, sum skulu gerast fyri hvørt einstakt verndarøki.

Harafturat er at nevna, at tað verða í uppskotinun sett høg krøv til vitanargrundarlagið í náttúrufyrisitingini, samstundis sum tað er greitt, at lítil vitan er um støðuna hjá føroysku náttúruni í dag. Kortini er í lógini ásett ein meginregla um varsemi, sum heimilar fyristingarligum avgerðum at verða tiknar, hóast vantandi vitan valdar á økinum. Ferðavinnufelagið óttast í hesum sambandi, at ásetingin í § 9 gevur fyrisitingarmyndugleikanum ov víðar ræsir at seta í verk fyrisitingartiltøk, tá ið vitanartrot er á økinum, og at tað tí er vandi fyri, at greinin fer at virka sum ein blankakekkur, tá ið vitanarkravið ikki kann uppfyllast. Felagið mælir til, at lagt verður upp fyri tílíkum støðum í endaliga lógaruppskotinum, sum verður borið løgtinginum.

Ferðavinnufelagið vil at enda fegnast um tann leistin, ið er valdur í málsviðgerðini av verndarøkjunum, har dentur verður lagdur á gott samstarv við allar viðkomandi partar, teirra millum vinnuligu áhugamálini í økjunum.

Vinarliga
**FERÐAVINNUFELAGIÐ**

Birita Johansen

Vinnuhúsið • Boks 1038 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn Tlf. +298 30 99 00 • Fax +298 30 99 01 • E-mail: industry@industry.fo